# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Nógvar bygdir eru avbyrgdar, og bjargingarliðini stúra fyri, hvat kann vera hent har*

*(Jette Lune, neyðhjálparfólk í Peru)*

# 510 funnin deyð

**Meiri enn 20 danskir ríkisborgarar í Peru hava ikki latið frætta frá sær síðani jarðskjálvtan í gjár**

Bjargingarlið hava higartil funnið 510 fólk deyð eftir jarðskjálvtan í Peru í gjár, og umleið 1.600 fólk hava fingið skaða. Myndugleikarnir bera ótta fyri, at talið á deyðum fer at veksa, tí enn eru fleiri bygdir, sum bjargingarliðini ikki eru komin til.

Danska uttanríkisráðið hevur síðani jarðskjálvtan roynt at fáa samband við danskar ríkisborgarar, sum vóru í Peru, men enn hava meiri enn 20 danir ikki latið frætta frá sær, sigur uttanríkisráðið í Keypmannahavn.

Stjórnin í Peru hevur biðið umheimin um hjálp, og ST, ES, USA, Kanada, Brasil og Kolombia hava sent tjøld, heilivág og ymsa aðra neyðhjálp til tey neyðstøddu. Myndugleikarnir siga, at jarðskjálvtin gjørdi serliga stóran skaða í økinum kring býin Pisco, og umleið 70 prosent av býnum er javnaður við jørðina.



*Bjargingarliðini vænta, at talið á deyðum fer at veksa*

# Virðið á donskum partabrøvum raplar niðureftir

**Partabrævavirðið á Fondsbørsinum í Keypmannahavn minkaði 59 mia. krónur eftir nøkrum tímum í gjár**

Dagurin í gjár var tann ringasti á Fondsbørsinum í Keypmannahavn tey seinastu fimm árini. Partabrøvini í C20-fyritøkunum fall 4,3 prosent, og eftir nøkrum fáum tímum fall partabrævavirðið knappar 60 mia. krónur. Tað merkir, at síðani tann 23. juli er virðið á teimum fyritøkunum, sum eru skrásettar á Fondsbørsinum, minkað 144 mia. krónur.

Men dagurin í gjár var bara ein av fleiri, og tað er heldur ikki bara í Danmark, at virðisbrævavirðið minkar. Gongdin er tann sama á fleiri marknaðum, eisini tí amerikanska, og summir serfrøðingar vænta, at tað kann enda við einari heimsumfatandi kreppu sum í 1998.




*Danska partabrævavirðið er minkað óvanliga nógv*

# Ársins fyrsta ódn á veg

**Tann fyrsta tropiska ódnin í ár hevur fingið navnið Dean, og hon kann gerast sera vandamikil**

Í Texas hevur tropiski stormurin Erin gjørt um seg tað seinasta samdøgrið við vindi og óvanliga nógvum regni, men amerikonsku veðurmenninir ávara um, at verri veður er á veg.

Úti í Karibiska Havinum er tropiska ódnin Dean í ferð við at menna seg. Veðurmenninir siga, at hon verður helst ein ódn í flokki fýra, tá hon ætlandi kemur til Jamaica fyrst í næstu viku, og at hon kann gera stóran skaða, tá hon fer um Meksikanska Flógvan.

Amerikonsku myndugleikarnir hava teir seinastu dagarnar eggjað fólki til at fyrireika seg til ódnarveðrið.



*Fylgisveinamynd av ódnini Dean*

## STUTT SAGT

### Vístur úr USA

Ein amerikanskur dómstólur hevur gjørt av, at ein 91 ára gamal maður av litavskum uppruna skal vísast úr USA, tí hann var við til at jagstra og myrða polskar jødar undir seinna heimsbardaga. Sambært úrskurðinum var Vladas Zajanckauskas við í Trawniki-deildini, sum millum annað beindi fyri jødum í Warszawa. Innanríkisráðið í Washington sigur, at høvdu innferðarmyndugleikarnir havt upplýsingarnar um fortíðina hjá Vladas Zajanckauskas, tá hann kom til USA í 1956, var hann ongantíð vorðin amerikanskur ríkisborgari.

### Gíslar enn

Enn røkist einki fyri, at teir fimm donsku sjómenninir, sum eru gíslar umborð á farmaskipinum „Danica White“, verða latnir leysir. Nú eru næstan 80 dagar, síðani skipið bleiv rænt uttan fyri somalisku strondina. Skiparin hevur í einum teldubrævi sagt, at burturflytararnir vilja hava átta mió. krónur í loysigjaldi fyri skip og manning, men sambært donskum fjølmiðlum vil reiðaríið hjá skipinum ikki gjalda meiri enn tvær mió. krónur.

### Grikkar á val

Grikski forsætisráðharrin, Costas Karamanlis, kunngjørdi í gjár, at hann hevði gjørt av at skriva út val til tjóðartingið, og at valið verður tann 16. september. Upprunaliga skuldu grikkar ikki á val fyrr enn í mars næsta ár, men í seinastuni er stuðulin til stjórnina og stjórnarflokkin Nýtt Demokrati minkaður so nógv, at forsætisráðharrin heldur seg hava betri møguleikar nú enn til várs.